Neistin-Kyndil 25-21 (16-9):

Neistin eigur framvegis høvuðsstaðin

Tað eydnaðist aftur neistakvinnunum at basa grannunum, men hesa ferð sýndu kyndilskvinnurnar nógv størri vilja, enn tær hava gjørt seinnu tvey árini, og tað var eisini um reppið, at tær fingu vent eini annars vónleysari støðu

HONDBÓLTUR-KVINNUR
Jákup Mørk

Tað var við stórum spenningi, at áskoðararnir høvdu leitað sær niðan á Háls sunnudagin, har bestu kvinnuliðini hjá Kyndli og Neistanum skuldu takast. Bæði liðini hava verið fyri stórum broytingum í mun til seinasta vetur. Hjá Neistanum vóru mest sum allir bakspælararnir skiftar út, og hjá Kyndli er málið nú at rætta skútuna uppaftur, eftir at tær nærum kollsigldu fullkomuliga seinasta vetur.

Serliga í verjupartinum var leyst hjá Kyndli í fyrra hálvleiki, og hett gav gott pláss til Atu Høgnadóttur á strikuni, sum bæði skoraði og spældi upp til fleiri mál hesa løtuna
Mynd: Álvur Haraldsen

Verjan á muni

Fyrstu løtuna tóktist nervin í uppgerðini eisini at forða fyri, at nakar partur fekk veruligt glið á spælið. Partarnir líka sum vigaðu hvønn annan á vágskálini, men tá so glið endiliga kom á, var tað fyrst og fremst hjá Neistanum.

Kyndil hevur í ár eina rættiliga vælvaksna verju, og hetta skuldi helst eisini borgað fyri eini sterkari verju, men tað var so als ikki talan um hesa løtuna. Snøgt sagt, so snorksvav verjan ferð eftir ferð, og serstakliga dugdi Súna Mørk væl at gera sær dælt av hesum, tá hon einar fýra ferðirnar rann beinte ígjøgnum, fyri síðani at fáa bóltin frá strikuni.

Hevði talan verið um dyst fyri einum ári síðani, so var lítið at ivast í, at Kyndil var fallið fullkomuliga í fátt eftir fyrsta hálva tíman, men nú er eitt nýtt ár, og hugburðurin hjá Kyndli tóktist eisini vera fullkomuliga broyttur.

Dýr útvísing

Frá byrjan av seinna hálvleiki fóru tær undir at toga seg nærri Neistanum. Súna og Simona vórðu mansvardar, soleiðis at teirra leiklutur ikki skuldi gerast eins stórur, og í álopspartinum fór Lotte Sørensen at prógva, at hon framvegis skal teljast millum tær allarbestu.

At trýstið nú veruliga merktist hjá Neistanum kom eisini til sjóndar, tá fyrst Súna og síðani Simona brendu brotskøst, og so við og við tóktist dysturin at skula koppa til Kyndil. Upp á 15 minuttir broyttist støðan frá 19-13 til 21-20, og tó at Simona mest sum einsamøll royndi at muta ímóti, so tóktist hetta at skula gerast ov lítið.

Kanska gjørdist spenningurin ov stórur hjá Kyndli, ella kanska var tað bara møðin, sum var farin at gera seg galdandi, men í øllum førum var tað ein ikki serliga væl umhugsað avgerð, tá Ann Mari bert triggjar minuttir fyri leiklok fekk tveir fingrar, tá hon hekk í Simonu.

Sjey ímóti seks megnaðu tær bláu hesa løtuna at økja munin upp aftur í trý mál, og so var alt í roynd og veru liðugt hjá Kyndli.

Verður spennandi

Hóast tapið, so skerst ikki burtur, at Kyndil væl og virðiliga kann nýta dystin til nakað positivt. Fyrst og fremst eigur tað at telja rætta vegin, at hugburðurin tykist fullkomuliga broyttur frá í fjør, og tá verjuspælið er fingið í rættlag, eigur hetta at kunna tryggja liðnum fleiri stig. Og so kann tað eisini gerast heilt spennandi, tá ætlaði jugoslaviski leikarin kemur til landið.

Eisini liðið hjá Neistanum tykist í ár at kunna gerast heilt spennandi. Hóast tær enn ikki hava fingið nakra gleði av Jórun Ludvig og Christinu Holm, so tykist liðið aftur í ár at hava møguleikan at gera seg galdandi í fremstu rød. Ikki minst tykist Simona Dziugyte at kunna gerast sannur fongur hjá liðnum, og so skal ikki gloymast, at við Helenu Dam og Maritu Hermansen hevur liðið tveir av bestu málverjunum í landinum at velja ímillum, og tað kann telja heilt nógv, tá javnir og tættir dystir standa á skránni.

Dysturin í tølum
Neisin-Kyndil
25-21 (16-9)

Málskjúttar:
Neistin: Simona Dziugyte 9(1), Súna Mørk 7(1), Ata Høgnadóttir 3, Lív Sørensen 2, Mildrið Jacobsen 1, Susan Brockie 1, Kára á Dunga 1

Kyndil: Lotte Sørnesen 13(7), Ann Mari Vang 3, Annika Ljósstein 2, Heidi Maria Akselsen 2, Ann Hansen 1
Brotskøst: Neistin 5, Kyndil 10
Útvísingar: Neistin 1, Kyndil 4
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum & Carsten Andersen

VÍF-Tjaldur 30-18 (13-9):

VÍF í vanligum stíli

Meistararnir úr VÍF byrjaðu árið í vanligum stíli, tá tær uttan stórvegis hóvasták vunnu greiðan sigur á Tjaldrinum

HONDBÓLTUR-KVINNUR
Jákup Mørk

VÍF gav ikki hinum liðunum í deildini stórvegis vónir, tá tær í fyrsta dystinum á árinum tóku ímóti Tjaldri.

Tað var nú kanska heldur ikki væntandi, at uppflytararnir fóru at gera nakað sum helst við meistararnar, og tað gjørdu tær sum so heldur ikki.

Fyrstu løtuna megnaði Tjaldur so dánt at fylgja við, men tá VÍOF so setti ferð á seinnu helvt av fyrra hálvleiki, varð allur ivi beindur burtur. VÍF fór hesa løtuna frá 9-8 til 13-9, og í seinna hálvleiki var bara ein gongd leið. Uttan at tær á nakran hátt overvaðu seg, øktu vestmannakvinnurnar javnt og samt.

Við sigrinum fekk VÍF um ikki annað eina hálvgum flúgvandi byrjan upp á kappingarárið, og so má tíðin bara vísa, um hesin veturin fer at eydnast eins væl sum teir báðir undanfarnu.

Fyri Tjaldur nýtist greiða tapið ikki at merkja nakað stórvegis sum so. Av øllum hugsandi støðum mundi Vestmanna vera tað torførasta staðið at byrja kappingarárið, og sum onkur mundi taka til. So hava tær nú verið har, meðan øll hini eiga dystin í Vestmanna til góðar.

Dysturin í tølum:
VÍF-Tjaldur 30-18 (13-9)
Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 9 (3), Fríða Marjunardóttir 5(1), Nicoleta Radu 5, Ioana Rápa 4(1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3, Eyðbritt Andreasen 2, Hertha Simonsen 1(1), Alis Høghamar 1
Tjaldur: Milica Ergic 9(2), Oddvá Fossdalsá 3, Heidi Jacobsen 2, Beinta Joensen 2, Lajka Ribaric 1, Hansa Mikkelsen 1
Brotskøst: VÍF 7, Tjaldur 4
Útvísingar: VÍF 3, Tjaldur 7
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum

U–19 kvinnurnar á veg til Bulgaria

B36 tykist eiga bestu framtíðina í kvinnukappingini, tí seks av teimum átjan spælarununm í ferðalagnum, sum er á veg til Bulgaria, eru úr árstalsfelagnum

U–19 KVINNUR
Jóannes Hansen

Fyrrapartin í gjár fór U–19 kvinnulandsliðið í fótbólti av landinum. Umvegis Keypmannahavn eru tær á veg til EM undankappingarumfar í Bulgaria. Tær skuldu í gjárkvøldið flúgva úr Keypmannahavn og til bulgarska høvuðsstaðin Sofia. Úr høvuðsstaðnum skuldu tær í nátt koyra í bussi tvørtur um so at siga alt Bulgaria. Sambært skránni skuldu tær koma til Varna eystur við Svartahavið klokkan seks í morgun. Tað er har, at kappingin verður frá í morgin og inntil sunnudagin.

Fyrsti dysturin verður í annaðkvøld ímóti vertstjóðini. Fríggjadagin skulu føroysku kvinnurnar spæla ímóti Litavia, og sunnudagin skulu tær spæla ímóti Onglandi.

Flestu spælararnir eru úr høvuðsstaðnum. Burtursæð frá AB, B36 og HB eru tað bara B68 og KÍ, sum eru umboðað í Bulgaria.

Seks spælarar úr B36 eru í ferðalagnum. Tær eru Rósmari Haraldsen, Heidi Hansen, Selma Dahl Erol, Unn Kragesten, Ása á Neystabø og Ása Christiansen. Úr HB eru Randi Wardum, Linda Weihe, Kristina Simonsen og Malan á Dunga. AB spælararnir eru Elin Kathrina Haraldsen, Asta Magnussen og Maria Michelsen, og úr B68 eru tað Maibritt Olsen og Mary–Ann Isaksen.

Tríggir KÍ spælarar skulu við til Bulgaria. Talan er um Jóhonnu Ólavsdóttir, Elsu Mariu Simonsen og Petru Sjóstein. Tær tríggjar komu til Keypmannahavnar úr Umeå í Svoríki seinnapartin í gjár. Í Umeå hava tær saman við KÍ spælt í Europa Cup.

Venjari er Álvur Hansen, Jón Harald Poulsen, er hjálparvenjari, Hedvig Matras er fysioterapeutur, Elin Christiansen er liðleiðari, og Guðrið Joensen er ferðaleiðari.

Neistin-Kyndil 26-21 (12-10):

Favorittarnir koppaðu

Neistin tykist framvegis at eiga sterkasta liðið í Havnini, eftir at teir í fyrsta dystinum koppaðu favorittunum úr Kyndli

HONDBÓLTUR-MENN
Jákup Mørk

Tað eydnaðist Neistanum at vinna ein rættiliga óvæntaðan sigur, tá teir í fyrsta dystinum spældu grannauppgerð móti Kyndli.

Árið í ár er annars fyri tað mesta sett av til at byggja eitt nýtt lið upp í Neistanum, meðan tað hinvegin hevur verið væntað nógv av Kyndli, sum hevur styrkt munandi um liðið til kappingarárið.

Alt vendi tó á høvdinum sunnudagin, ella kanska gjørdi tað kortini ikki. Sum roknast kundi við, so var striðsviljin hjá Neistanum í topp frá fyrsta bríksli, og tað var hampuliga skjótt, at teir fingu eitt gott tak á Kyndli.

Eitt skifti var munurin heilt uppi á fimm málum, men spakuliga fekk Kyndil otað seg aftrur í dystin, soleiðis at munurin bert var tvey mál, tá farið varð til hálvleiks.

Jacob Jónsson royndi tað, hann var mentur, móti fyrrverandi liðfeløgunum, men einsamallur megnaði hann ikki draga eitt annars skuffandi Kyndils-lið til sigurs
Mynd: Álvur Haraldsen

Jacob einsamallur

Ein skuldi tí kanska trúð, at Kyndil fór at leggja á annan bógv, nú liðini komu úr skiftirúmunum, men hetta varð tó av ongum.

Framvegis var tað Neistin, sum hevði munin. Kanska ikki við so øgiliga ferðmiklum spæli, men teir dugdu at brúka styrkir sínar. Royndu at spjaða spælið nógv, soleiðis at Kyndil noyddast at opna verjuna, og tá møguleikin so beyðst, varð avsluttað.

Kyndil hinvegin megnaði ongan tíð at fáa ta ferðina á spælið, sum annars skuldi verið avgerandi fyri, at tað skuldi eydnast teimum at vinna. Jacob Jónsson vísti í sínum lag, at hann framvegis er millum teir allarbestu leikararnar í landinum, men hóast hetta, so megnar hann ikki einsamallur at skjóta liðið til sigurs.

Heilt leingi megnaði Jacob tó at halda Kyndli í dystinum, men at enda mátti eisini hann gvast, og sienastu tíggju minuttirnar fekk Neistin aftur lagt sjógv ímillum, soleiðis at sigurin ikki kom í vanda aftur.

Tað er eingin loyna, at fyri Kyndil var hetta eitt stórt vónbrot, men samstundis mugu teir ásanna, at teir fyrst og fremst hava sær sjálvum at takka, at tað gekk, sum tað gekk. Fólkið á liðinum átti í øllum førum at borga fyri somikið stórari góðsku, at liðið kann taka dystin upp móti teimum bestu í deildini, men til tað krevst undir øllum umtsoðum, at viljin at vinna dystirnar er til staðar.

Fyri Neistan mundi sigurin kennast sera fløvandi, tí tað er eingin loyna, at teir ikki teljast millum favorittarnar í ár. Við einum hópi, sum fyri tað mesta telur egnar leikarar, er tó kortini sannlíkt eftir hendan dystin, at teir fara at arga okkurt av størri liðunum. Hvussu langt tað røkkur í longdini, má tíðin fara at vísa, men sunnudagin var so sjón fyri søgn, at hugburðurin til uppgávuna er hin rætti, og tað kunnu grannarnir helst læra nakað av.

Dysturin í tølum
Neistin-Kyndil
26-21 (12-10)
Málskjúttar:
Neistin: Áki Mørk 7(3), Ragnar Stakksund 5, Dann Thorleifsson 5, Morgan Knezevic 4(1), Helgi Justinussen 3, Birgir Kass 1, Helgi Justinussen 1
Kyndil: Jacob Jónsson 8(2), Hans Áki Dal-Christiansen 4(1), Janus Einar Sørensen 3, Regin Johannesen 3, Ken Zachariasen 2, Hanus Jensen 1
Brotskøst: Neistin 6, Kyndil 5
Útvísingar: Neistin 4, Kyndil 2
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum & Carsten Andersen

1. Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	1	1 - 0 - 0	30	18	12	2
2	Neistin	1	1 - 0 - 0	25	21	4	2
3	StÍF	0	0 - 0 - 0	0	0	0	0
4	Stjørnan	0	0 - 0 - 0	0	0	0	0
5	VB	0	0 - 0 - 0	0	0	0	0
6	Kyndil	1	0 - 0 - 1	21	25	-4	0
7	Tjaldur	1	0 - 0 - 1	18	30	-12	0

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Neistin	1	1 - 0 - 0	26	21	5	2
2	H71	1	1 - 0 - 0	18	14	4	2
3	VÍF	1	1 - 0 - 0	0	0	0	2
4	StÍF	0	0 - 0 - 0	0	0	0	0
5	Tjaldur	1	0 - 0 - 1	0	0	0	0
6	KÍF	1	0 - 0 - 1	14	18	-4	0
7	Kyndil	1	0 - 0 - 1	21	26	-5	0

Tað gjørdist Ion

Kristian á Neystabø, formaður í B36, og Ioan Geolgau hava nú givið hvørjum øðrum hondina upp á eitt framtíðar samstarv

Ion Geolgau og B36 hava nú skrivað undir sáttmála, og soleiðis er nú staðfest, at rumenin nú skiftir síðu eftir nærum fimm ár í HB

VENJARI
Jákup Mørk

Í seinasta mikudagsblað okkara skrivaðu vit, at B36 eftir øllum at dømu fór at hava Ion Geolgau sum venjara komandi kappingarárið. Hóast keldur í B36 váttaðu hesi tíðindi fyri okkum, so fekst ikki nøkur almenn váttan frá formanninum um hetta, men nú skuldi seinasti ivin so verið burtur.

Sum tað sæst á myndini, so hava B36 og Ion givið hvørjum øðrum hondina upp á eitt framtíðar samstarv, og sum vera man, so eru partarnir báðir nøgdir um hetta.

H71-KÍF 18-14 (9-8):

Rótut í Hoyvík

Talan var ikki um nakran væl leiktan hondbóltsdyst, tá H71 og KÍF settu sjøtul á hondbóltskappingina

HONDBÓLTUR-MENN
Jákup Mørk

Talan var um fyrsta dystin á árinum, tá H71 og KÍF hittust í nýggju Hoyvíkshøllini, og í nógvar mátar bar dysturin eisini brá av, at enn eru liðini ikki komin í røttu snúningarnar.

Yvirhøvur var talan um ein rættiliga rótutan dyst, har liðini høvdu sera ilt við at spæla seg ígjøgnum mótstøðuverjurnar, og har talan tískil oftani gjørdist um hart kropsligt spæl frá báðum portum.

Tað vóru alt fyri eitt hoyvíkingar, sum settu seg á dystin, og teimum eydnaðist eisini at skjóta fimm mál, áðrenn kollfirðingarnir svaraðu aftur, men so gekk eitt sindur meira javnt á. Spakuliga – og einamest Óla Kristian Djurhuus fyri at takka – arbeiddu kollfirðingar seg inn í dystin, og tá farið varð til hálvleiks stóð mest sum á jøvnum millum liðini.

Halgir Dahl Olesen og H71fingu ein sigur í fyrsta dystinum, tá KÍF var á vitjan
Mynd: Álvur Haraldsen

Í seinna hálvleiki helt sama gongdin fram. Hoyvíkingar høvdu kanska takið, men KÍF hevði Óla Kristian og um miðjan hálvleikin stóð framvegis á jøvnum. Seinasta korterið eydnaðist tó bert eina ferð hjá kollfirðingunum at skora, meðan Hoyvíkingarnir skutu fimm mál, og so fekst hóast alt ein tryggur sigur burturúr hjá heimaliðnum.

Tað var tó sjón fyri søgn, at talan her var um tvey lið, sum nokk ikki skulu gera sær tær heilt stóru vónirnar um at gera seg galdandi í oddinum, men sum ístaðin koma at stríðast um at halda seg so langt burturi frá botninum sum gjørligt.

Dysturin í tølum
H71-KÍF 18-14 (9-8)
Eingin dómaraseðil komin
Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen